Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Bíðilistin til Megna títt lív

Spurningar:

1. Hví eru 18 fólk á bíðilista til tænastuna Megna títt lív?
2. Hvussu nógv kostar tað at fáa hendan bíðilistan burtur?

Viðmerkingar:
Í svari frá landsstýrismanninum fyrr í vikuni bleiv upplýst, at 18 fólk standa á bíðilista til tænastu frá Megna títt lív. Her er ofta talan um ung fólk, sum hava brúk fyri hjálp her og nú, tí tey hava svárar sosialar ella sálarligar trupulleikar og álvarsligar rústrupulleikar. Tí kann ein bíðilisti gera ilt verri. Fyri at vita, hvussu vit kunnu sleppa undan bíðilistanum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 11. november 2021

Eyðgunn Samuelsen